# STONGT VEGNA NORMALISERING

**CHRISTIANIA**. ÍMYNDIN AV TÍ **SKEIVA** OG **ALTERNATIVA**. STAÐIÐ, HAR **LISTARLIGA**- OG PERSÓNLIGA **FRÆLSI** ER Í **HÁSÆTI**. EITT **FRÍPLÁSS** FRÁ STRESSANDI **GERANDISDEGNUM**. EIN **FELAGSSKAPUR** FYRI **ØLL**, HAR VIT KOMA **HVØRJUM** ØÐRUM VIÐ. **CHRISTIANIA**. ÍMYNDIN AV TÍ RÁA OG **RÆÐULIGA**. STAÐIÐ HAR **ÓHUGNALIGAR** BROTSGERÐIR, **HARÐSKAPUR** OG DRÁP ERU **GERANDISDAGUR**. EITT **FRÍPLÁSS** FYRI KALDAR OG **KYNISKAR** BROTSMENN. EIN **FELAGSSKAPUR** FYRI **HARÐASTU** OG MEST **BRUTALU** KJARNUNA Í **RÍKINUM**. SOLEIÐIS SÍGGJA **VERULEIKARNIR** KRING CHRISTIANIA ÚT, MEN HETTA SKAL **BROYTAST**, ERU **BOÐINI** FRÁ **CHRISTIANSBORG**. NÚ UMHUGSA **CHRISTIANITTARNIR** FRAMTÍÐARSTØÐUNA



PORTRETT
Rólant Waag Dam
rolant@sosialurin.fo

Christiania er stongt í hesum døgum. Júst sum bókasavnið, handlarnir og bensinstøðirnar eru tað. Tað er ikki hent áður, síðani aktivistar í 1971 valdu at búseta seg í býarpartinum á Christianshavn, sum í dag telur 34 hektar og umleið 700 íbúgvar.

Orsøkin til afturlatingina er sperda støðan, frístaðurin og íbúgvar tess eru komin í. Eitt ultimatum frá donsku stjørnuni. Annaðhvørt játta tey, at ein stórur partur av bústøðunum verða partur av einum almennum bústaðarfelag, ella keypa tey sjálvi bygningarnar.

### Trupulleikin

Sum støðan er í dag, eiga íbúgvarnir á Christinia ikki bygningarnar, tey búgva í ella grundstykki, tey hava bygt á. Tað hava tey ongantíð gjørt, síðani fólk fluttu til staðið í 1971. Kortini búsettust tey har í tómu bygningunum, sum vóru har frammanundan. Síðani hava tey bygt nýggj hús, útbygt og umvælt tey gomlu. Fram til 1989 var eingin lóg á økinum. Í 1989 kom so lóggáva, har tað var staðfest, at Christiania var undantikið vanligu byggilóggávuni, umframt at christianittarnir høvdu nýtslurætt til økið og bygningarnar.

Tey, sum búgva í hesum bygningum rinda ikki húsaleigu, men eitt nýtslugjald á 1400 krónur um mánaðin. Hesin peningur fer til at reka og varðveita Christinia. Harumframt rinda




MYND: POLFOTO

íbúgvarnir, eins og øll onnur, streym, hita og aðrar útreiðslur.

Støðan við íbúgvunum og bygningunum merkir, at eingin kann selja húsini og soleiðis ført tú heldur ongan fíggjarligan vinning burtur úr íløgum sum útbygging ella renovering. Hetta fær hann, sum yvirtekur húsið, hinvegin gleði av. Hvør tað er, verður avrátt á einum borgarafundi, har allir christianittar kunnu greiða atkvøðu. Tað merkir, at tað er gott at kenna onkran, sum er inni í hitanum frammanundan, tí ofta ganga húsini í arv soleiðis skilt, at børn, familja ella vinfólk yvirtaka bústaðin, sum onkur flytir frá. Men í prinsippinum kunnu ein og hvør, tú og eg, søkja um ein bústað á Christinia.

Áðurnevnda avtala frá 1989 varð uppsøgd í 2004 og síðani hava staturin og Christiania togast aftur og fram um, hvør eigur rætting til økið og bygningarnar.

### Hava stongt Christinia

Í februar kom endaliga svarið í hesum stríðnum. Hægstirættur staðfesti í februar, at danski staturin eigur bæði jørð og bygningarnar á Christiania. Hetta hevur politiski myndugleikin tikið til sín og handlar hareftir. Tey ynskja at fáa skil í og skipaði viðurskifti á Christinia. Tí hevur Slots- og ejendomsstyrelsen bjóðað Christinia at keypa ognirnar har fyri 150 milliónir krónur. Fermetraprísurin verður sostatt 3.100 krónur, sum er munandi bíligari enn fermetraprísurin fyri ognir, sum liggja í grannalagnum. Her er fermetraprísurin omanfyri 30.000 krónur.

Í flestu førum ljóðar hetta sum eitt einastandandi tilboð, men ikki fyri christianittarnar. Fyri tey er hetta enn ein liður í at normalisera Christiania. Ein staðfesting av, at tað sum av politikkarum fyri 40 árum varð góðtikið sum eitt sosialt eksperiment, er eitt yvirstaðið kapittul.

Christianittarnir mugu umhugsa støðuna. Koma til eina niðurstøðu og boða fíggjarmálaráðharranum Claus Hjort Frederiksen frá. Í dag er fríggjadagur. Leygurdagur. Sunnudagur. Mánadagur. Tá skulu bæði tey og hann vita, um Christiania keypir ognirnar, sum staturin eigur, ella um ognirnar skulu verða partur av einum almennum bústaðarfelag. Tvinnir eru kostirnir og hvørgin er mjúkur.

Christianittarnir stúra nevniliga fyri, at tað kann enda við eini kapitalisering av bústaðunum, sum í síðsta enda hevur við sær, at margfeldni fellur burtur og at rík saman við øðrum ríkum koma at mynda økið.

»Henda avtala merkir, at vit fáa meiri ▶